# INNBJÓÐING TIL UNDANGÓÐKENNING

## TALGILDING AV MATRIKUL- OG TINGLÝSINGARARKIVUNUM Á UMHVØRVISSTOVUNI

Talgildu Føroyar skulu gera sáttmála um talgilding av tinglýsingar- og matrikularkivunum. Í hesum sambandi ber til hjá áhugaðum veitarum at biðja um undangóðkenning (prekvalifikatión).

Teir veitarar, sum verða undangóðkendir (prekvalificeraðir), fáa frá Talgildu Føroyum útflýggjað endaligt útbjóðingartilfar við nágreiniligum krøvum til veitingina at geva tilboð út frá.

Talgildu Føroyar tilskila sær rætt til at velja upp í tríggjar teir best skikkaðu veitararnar - í mun til krøvini niðanfyri - til at gerast undangóðkendir.

Tilgongdin at finna rætta veitaran fer væntandi at vara til **mánaðarskiftið mai/juni 2018**, tá sáttmáli verður gjørdur við tann veitara, ið vinnur útboðið.

Í stuttum skal veitari, sum ynskir at verða undangóðkendur, lúka hesi krøv:

Veitarin skal skjalprógva, at fyritøkan:

- hevur fíggjarligt grundarlag fyri at fremja uppgávuna
- ikki hevur skuld til tað almenna
- hevur framt líknandi uppgávur seinastu trý árini

Veitarin kann antin lúka omanfyristandandi krøv einsamallur, í einum samábyrgdandi samtaki ella í samstarvi við undirveitarar.

Talgildu Føroyar skipa fyri kunningarfundi um útboðið **týsdagin 13. mars 2018 kl. 14 – 16 á Umhvørvisstovuni, Traðargøta 38, Argir.** Arkivini verða sýnd fram, og høvi verður at seta spurningar.

Veitarar skulu við telduposti til Dánjal Paula Haraldsen, verkætlanarleiðara, danjalph@us.fo, í seinasta lagi **fríggjadagin 16. mars 2018 kl. 12** boða frá, um teir **ætla** at søkja um undangóðkenning.

Um eingin veitari boðar frá hesum, tilskila Talgildu Føroyar sær rætt til at avlýsa útboðið. Um bert ein veitari boðar frá **ætlan** at søkja um undangóðkenning, tilskila Talgildu Føroyar sær rætt til at fara beinleiðis í samráðing við viðkomandi veitara ella at avlýsa útboðið.

Umsóknin um undangóðkenning, har veitarin skjalprógvar, at hann livir upp til ásettu krøvini, skal sendast við telduposti til danjalph@us.fo seinast **mikudag 11. apríl 2018 kl. 12**.

Til ber hjá møguligum veitarum at seta skrivligar spurningar um útboðið og settu krøvini v.m. við telduposti til danjalph@us.fo. Settir spurningar verða gjørdir navnleysir og svaraðir so hvørt. Spurningar og svar verða almannakunngjørd so hvørt á www.keypsportal.fo. Freist at seta spurningar til undangóðkenningartilfarið er **mikudagin 28. mars 2018 kl. 12.**

Sum partur av hesum undangóðkenningartilfari eru hesi fylgiskjøl:

| Fylgiskjal | Heiti | Lýsing |
|---|---|---|
| 1 | Krøv til undangóðkenning | Krøv og vegleiðing til skjalfesting.<br>Fylgiskalið er á føroyskum og enskum. |
| 2 | Bakgrund og nærri lýsing av uppgávuni | Nærri kunning um arkivið, um uppgávuna og tíðarætlan.<br>Fylgiskalið er á føroyskum og donskum. |
| 3 | ´Foranalyse´ okt – sept 2017 | Frágreiðing frá forkanning, sum Talgildu Føroyar hevur latið gjørt saman við ráðgevarafyritøku. Skjalið lýsir uppgávu og avbjóðingar og gevur tilmæli um, hvussu uppgávan kann fremjast í verki.<br>Fylgiskjalið er bert á donskum. |

Um ósamsvar er millum føroysku og ávikavist donsku og ensku útgávurnar, er tað **føroyska útgávan,** ið hevur forrættindi.